## Norðoya Sparikassi stórt avlop

**Úrslitið hjá Norðoya Sparikassa fyri 2004 var eitt lítið vet verri enn árið fyri, men avlopið er framvegis trivaligt**

AVLOP

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Norðoya Sparikassi hevði mest sum sama úrslit í 2004, sum sparikassin hevði árið fyri.

Úrslitið hjá Norðoya Sparikassa fyri 2004 gjørdist eitt avlop áðrenn skatt uppá 21,9 mió. kr., móti 21,8 mió. kr. í 2003. Endaliga ársúrslitið eftir skatt gjørdist 17,1 mió.kr. móti 17,5 mió.kr. í 2003.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar øktust úr 57,5 mió. kr. í 2003 til 58,2 mió. kr. í 2004.

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting øktust við 2,9 % úr 29,0 mió. kr. í 2003 upp í 29,8 mió. kr. í 2004. Aðrar vanligar útreiðslur øktust úr 0,4 mió.kr. í 2003 uppí 2,9 mió.kr. 2004.

Innlánið hjá Norðoya Sparikassa vaks við 0,8 % í 2004, og útlánið vaks við 9,1 prosentum – upp í 971 milliónir krónur.

### Eginpeningurin veksur

Sparikassin hevði í 2004 eitt tap av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra uppá 0,5 mió. kr., móti einum tapi í 2003 uppá 1,3 mió. kr.

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar vóru 2,7 mió. kr. í 2004 móti 4,7 mió. kr. í 2003.

Eginpeningurin vaks við 7,1 % úr 242 mió. kr. í 2003 til 260 mió. kr. í 2004. Eginpeningurin er nú 21,6 % av samlaðu fíggjarstøðuni pr. 31.12.2004, móti 20,6 % pr. 31.12.2004.

Fíggjarstøðan hjá Norðoya Sparikassa javnvigaði tann 31.12. 2004 við 1.203 mió. kr. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 2,1 % í mun til 31.12.2003, tá fíggjarstøðan javnvigaði við 1.178 mió.kr.

Aðalfundurin hjá Norðoya Sparikassa verður í Klaksvík 22. februar.

# Hans Pauli gjørt motiv til nýggju 10-krónuna

**– Hetta var eingin løtt uppgáva, sigur myndahøggarin Hans Pauli Olsen, sum hevur gjørt motiv til nýggju 10-krónuna. 10-krónan er ein serlig H. C. Andersen-króna, og myndin er av tí misháttað dunnuunganum**



*– Eg varð biðin um at gera eitt motiv úr frá søguni um Den grimme ælling. Tað var eingin løtt uppgáva, og eg hugsaði meg leingi um og royndi ymiskt, áðrenn eg kom á rætta motivið, sigur myndahøggarin Hans Pauli Olsen*

LIST

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Danski Nationabankin ætlar sær at vera við í hátíðarhaldinum av 200 ára føðingardegnum hjá H. C. Andersen. Danir gera nógv burtur úr hesum runda degnum hjá teirra kendasta skaldið, og síðsta dagin í mars kemur fyrsti mynturin í eini serligar føðingardagsrøð hjá Nationalbankanum.

Danski tjóðbankin hevur gjørt eina nýggja 10-krónu, sum eisini fæst í silvuri og gulli. Annað motivið á hesari 10-krónu hevur føroyski listamaðurin Hans Pauli Olsen gjørt.

Hann hevur gjørt eitt motiv av einum fullvaksnum svana, sum speglar sær í vatninum við Bregentved Gods, har H. C. Andersen fekk íblásturin til sína heimskendu søgu, »Den Grimme Ælling«.




*Soleiðis sær motivið út, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt til nýggju 10-krónuna hjá Nationalbankanum. Umframt vanligu 10-krónuna kemur 10-krónan eisini í einari gull- og einari silvurútgávu, sum er serliga ætlað samlarum*

Framman á krónuni er eitt portrett av Margrethu Drotning, sum Mogens Møller hevur gjørt.

### Stór uppgáva

Uppgávan at tekna motivið til H. C. Andersen-krónuna kom, eftir at Hans Pauli Olsen hevði verið við at gjørt røðina við tornum.

– Eg varð biðin um at gera eitt motiv úr frá søguni um Den grimme ælling. Tað var eingin løtt uppgáva, og eg hugsaði meg leingi um og royndi ymiskt, áðrenn eg kom á rætta motivið, sigur Hans Pauli Olsen.

– Eg haldi, at spegilsmyndin er rættiliga sentral í søguni, og tí havi eg brúkt hana aftur í mínum verki. Søgan er jú um, tann vakra svanan, sum heldur seg vera ein ljótan dunnuunga.

Tað er sera trupult at gera eitt motiv til eina 10-krónu, tí motivið er so lítið.

– Tí brúkti eg lupp fyri at síggja, hvat tað var eg gjørdi. Mítt verk er tíggju ferðir størri enn sjálv 10-krónan, men tað er framvegis eitt lítið motiv at arbeiða við.

Ein serlig maskina syrgir fyri, at verkið hjá Hans Paula verður minkað niður til at passa á eina 10-krónu.

– Eg eri ovfarin av, hvussu nógvar smáar detaljur koma við, hóast motivið verður so nógv minkað. Maskinan er heilt fantastisk, og í grundini veitst tú als ikki, um tað, sum tú hevur gjørt, kann brúkast, fyrr enn tað er minkað niður til røttu støddina, sigur Hans Pauli.

### Samlarar fáa sítt

Umframt eina vanliga 10-krónu hevur Nationalbankin eisini gjørt eitt sindur eyka burtur úr til samlarar.

10-krónan kemur í einari gullútgávu og einari silvurútgávu. Hesir myntir verða avmarkaðir til ávíkavist 7.000 og 75.000 eintøk, og teir verða seldir fyri 2.000 og 200 krónur.

Nýggju samlaramyntirnir kunnu bíleggjast í peningastovnunum, og tað ber til at biða um ein slíka longu nú. Vanliga 10-krónan verður gjørt í 1,2 milliónum eintøkum.

*Hvussu er tað sum listamaður at hava eitt verk hjá sær á einari 10-krónu?*

– Tað er stuttligt at sleppa at royna hetta, og kanska fái eg møguleikan at gera okkurt afturat, sigur Hans Pauli Olsen.

# Tilbúgving undir sjóneykuna í Klaksvík

**Fríggjadagin í næstu viku skipar Norðoya Bjargingarfelag fyri temadegi um tilbúgving í Norðoyggjum**

TILBÚGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað verður mangt og hvat á skránni, tá ið Norðoya Bjargingarfelag setir sjóneykuna á tilbúgvingina í Norðoyggjum. Hetta verður gjørt í KÍ-høllini fríggjakvøldið í næstu viku.

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, fer at seta kvøldið, og Bjørn Kalsø, sum er landsstýrismaður við fiskivinnu-málum, fer eisini at røða – hann hevur tilbúgving sum sítt málsøki í almennu umsitingini.

Borgarstjórin á Flateyri í Íslandi, Haldór Haldansson, fer at tosa um tilbúgving í sambandi við skriður og omanlop, og Christian Maschmann, lækni, fer at tosa um sína verkætlan við læknaambulansu í Klaksvík.

### Nýggjur filmur sýndur

Karl Johansen, politistur, fer at umboða løgreglu, brandlið, sjúkrahús og onnur, tá ið hann tosar um tilbúgvingina í Norðoyggjum.

Ein nýggjur stuttfilmur, sum Norðoya Bjargingarfelag hevur gjørt í samstarvi við Tekniska skúla í Klaksvík, verður frumsýndur.

Umframt røðarnar ber eisini til at síggja ymiska útgerð og at seta fólki, sum starvast innan tilbúgvingina, spurningar.

Tiltakið byrjar fríggjakvøldið klokkan 19.00, og tað er ókeypis.